# Café Bedura, eitt gastronomiskt upplivilsi

Fyri gott og væl hálvum øðrum ári síðani, keyptu systrarnar Beinta Hansen, Durita Toftegaard og Rannvá Justinussen ein bygning, og eftir drúgvar umvælingar og umbyggingar, kundu tær á sjálvum kvinnudegnum, 13 mars 2008, lata upp matstovu undir navninum Café Bedura. Á hesi matstovu fæst mangt og hvat, og ikki kann sigast annað, enn at systrarnar hava hugsað um alt, til tess at kundar teirra kunnu fáa eina fullfíggjaða hugnaliga løtu. Á matarskránni, ið er fjølbroytt, og leskilig, er tað serliga tann leskiligi Bedurabúffurin, ið er væl umtóktur. Um vikuskiftið er vanliga livandi tónleikur, og allar dagar uttan leygardag og sunnudag er buffét eitt tíðarskeið á degnum. Staðið hevur skeinkiloyvi, og eru tað pør, ið koma á gátt við børnum, so er møgueliki hjá børnunum, millum annað at síggja film og at spæla spøl, skuldi hugur verið til tess. Av sonnum ein gastronomisk perla.






















